**Sørvágs Kommuna**
FO-380 Sørvágur • Tlf. +298 363200 & 363205 • Fax +298 363201
E-mail: sorvag@sorvag.fo

Hendrik Old

Landsstýrismaður í samferðslumálum

smr@smr.fo

Í sáttmálanum um samanlegging av Mykinesar- og Sørvágs kommunu stendur í innganginum, at bygdaráðini í Sørvági og Mykinesi staðfesta serstøðuna fyri Mykinesi sum útoyggj, og fær samanleggingin ikki ávirkan á viðurskiftini millum landsmyndugleikarnar og Mykines sum útoyggj.

Í samband við tað stóra ferðslulopið, ið hent er síðani Jósup kom at sigla Mykinesleiðina, hava Sørvágs kommuna og Landsverk verið samd um at kanna tvær verkætlanir, sum hava stóran týdning fyri tryggleikan hjá teimum, sum koma'í land á oynni.

Víðkan av atløgusíðu:

Vegna HMP Consult hevur Hans Haraldsen gjørt uppskot til atløgusíðu og kostnaðarmeting. Kostnaðarmetingin er upp á kr. 1.479.169 kr.

Viðvíkjandi bakkaverju:

Eisini hevur Hans Haraldsen gjørt uppskot til bakkaverju. Kostnaðarmetingin er upp á kr. 1.080.847 kr.

Vit hava fyri stuttari tíð síðani asfaltera Fjørdalsgøtuna, og eftir stuttari tíð kom riva í asfaltið, tí fóturin niðri á helluni í Gjónni gevur seg undan.

Í samband við samanleggingina hevur Sørvágs kommuna søkt um smærri upphæddir av játtani til infrakervið á útoyggj, men hesar upphæddirnar eru av slíkum slag, at hetta má undir onkra serliga játtan.

Við hesum skrivi verður heitt á landsstýrismannin at fáa figging til vega.

Tekningar av verkætlanunum hava Landsverk og Sørvágs kommuna.

Sørvágur, 21.11.2016

Vinaliga

Sørvágs kommuna

Sune Jacobsen, borgarstjóri